# Gávuspæl

Ger eina fitta gávu, pakka hana inn í jólapappír. Klipp seðlar út í passandi stødd (sí tekstin longri niðri) og legg teir í ein hatt, soleiðis at teir kunnu takast upp ein og ein.
Ein kann siga hetta:
Her er ein gáva, sum fer at ferðast runt. Eingin av okkum veit, hvør fer at fáa hana, tí her eru nakrir seðlar, sum siga, hvar eskjan skal. Og tann, sum er so heppin at fáa eskjuna, sleppir at eiga hana.
Hatturin og gávan fara síðani runt!
(Ein kann eisini bara hava ein posa hangandi á gávuni og koyra seðlarnar í posan ístaðin fyri hattin.)
Uppskot, hvat kann standa á seðlunum, sum fara runt.
Rætt gávuna til onkran, sum hevur eitt dreingjanavn við 5 bókstavum!
Rætt gávuna til onkran, sum er 3 ár!
Rætt gávuna til onkran, sum gongur í 5. flokki!
Rætt gávuna til tann, sum situr tættast við eina hurð!
Rætt gávuna til ta nærmastu gentuna, sum hevur oyralokkar!
Rætt gávuna til tann nærmasta persónin, sum hevur brillur!
Rætt gávuna til tann, sum situr tættast við teg!
Rætt gávuna til tann nærmasta persónin, sum hevur okkurt í hárinum!
Rætt gávuna til tann triðja, sum situr til vinstru!
Rætt gávuna til tann, sum sum situr næst til høgru!
Rætt gávuna til nærmasta drongin!
Rætt gávuna til tann, sum situr nærmast við ein vaksnan!
Rætt gávuna til nærmastu gentuna, sum gongur í 1. flokki!
Rætt gávuna til eitt barn, sum tú kennir ordiliga væl!
Rætt gávuna til nærmasta drong, sum gongur í 2. flokki!
Rætt gávuna til tann, sum hevur stytst hár!
Rætt gávuna til nærmastu gentuna!
Rætt gávuna til onkran, sum hevur okkurt grønt á sær!
Rætt gávuna til onkran, sum hevur okkurt reytt á sær!



Tá spælið er liðugt, kann hetta verða sagt við børnini:
"Gud hevur givið okkum ein gávu, sum ikki bara er til ein tilvildarligan persón, men tað er ein gáva, sum er til tín og til mín og til okkum øll.
Tað er Jesus. Hann kom til jarðar fyri at geva sítt lív fyri okkum. Vit hava fingið ta størstu gávuna, Jesus. Jesus ynskir, at vit skulu taka ímóti Honum, sum vit taka ímóti einari gávu. Tað eru bara tey, sum taka ímóti Jesusi, sum ein dag koma til Himmals, tí Hann er einasti vegurin til Himmals. Vit kunnu fortelja øðrum um Jesus, - geva av okkara gávu.
Kanst tú gera tað?"